# Kim Wilde leggur eftir Elton John

80'ára popdarlingin Kim Wilde, ið er best kend fyri lagið Kids In America, var herfyri í operahúsinum í Keypmannahavn í samband við jólakonsertina hjá Danmarks Radio. Her nýtti hon sambært The Sun høvið at leggja eftir Elton John.

– Hann er burtur úr vón og viti, tað hevur hann altíð verið, segði hon millum annað og helt fram við at greiða frá, at Elton John í alt ov nógv ár hevur livað í yvirflóð og tí hevur mist sambandi við veruleikan og er vorðin alt ov sjálvfeitur. Hon segði, at hon finnur seg ikki í tí, tá hennara børn skapa sær sum eitt ørt, og at tað er vemmiligt at síggja eitt vaksið menniskja uppføra seg soleiðis, sum Elton John ger. Hon viðgekk tó, at henni dámdi tónleikin men, at hon somuleiðis hevði lagt til merkis, at Elton John ongantíð skrivar sínar egnu tekstir.

– Eg havi ongantíð skilt Elton John, men nú skilji eg, at har er ikki so nógv at skilja, segði hon at enda í álopinum á popp kongin.

**nud**


Kim Wilde hevur fingið nóg mikið av Elton John
mynd: Scanpix.dk


Júst hvat Elton John hevur gjørt fyri at fáa øði í Kim Wilde vita vit ikki
mynd: scanpix

## HITLIST

**15 tær bestu** (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | The Dreams | Nummar |
| 2 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 3 | Týr | Wings Of Time |
| 4 | Villmenn ft. Rasmus Rasmussen | Kvølur |
| 5 | Nephew | Igen & Igen & |
| 6 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 7 | Scissor Sisters | I Don´t Feel Like Dancin' |
| 8 | The Pussycat Dolls | I Don't Need |
| 9 | Teitur | I Don't Want You To Wake Up |
| 10 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 11 | The Killers | When You Were Young |
| 12 | Jensina Olsen | Just Because |
| 13 | Europe | Always The Pretenders |
| 14 | Queen vs The Miami Project | Another One Bites The Dust |
| 15 | US5 | In The Club |

**Eykaløg**

| | |
|---|---|
| Eric Prydz vs Pink Floyd | Proper Education |
| Gia Farrell | Hit Me Up |
| Take That | Patience |
| Fergie | Fergalicious |
| Martin Joensen og hinir ft. Eivør | Kavin Kom |

**Tjeklisten** (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 2 | Thomas Helmig | Op og Ned |
| 3 | U2 & Green Day | The Saints Are Coming |
| 4 | Nephew | Igen & Igen & |
| 5 | The Killers | When We Were Young |
| 6 | Red Hot Chili Peppers | Snow (Hey Oh) |
| 7 | Infernal | Self Control |
| 8 | Robbie Williams | Lovelight |
| 9 | Take That | Patience |
| 10 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |
| 11 | Pink | U + Ur Hand |
| 12 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 13 | Natasja | Op Med Ho'det |
| 14 | Beyoncé | Irreplaceable |
| 15 | Nik & Jay | Når Et Lys Slukkes |
| 16 | Kashmir | Kalifornia |
| 17 | Westlife | The Rose |
| 18 | Christina Aguilera | Hurt |
| 19 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 20 | KNA Connected | Fibs (Løgn & Latin) |

**Top of the Pops** (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Take That | Patience |
| 2 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 3 | Booty Luc | Boogie 2nite |
| 4 | Nelly Furtado | All Good Things (Come To An End) |
| 5 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 6 | Beyoncé | Irreplaceable |
| 7 | Emma Bunton | Downtown |
| 8 | Fedde Le Grand | Put Your Hands Up For Detroit |
| 9 | Fratellis | Whistle For The Choir |
| 10 | Muse | Knights Of Cydonia |
| 11 | Westlife | The Rose |
| 12 | Razorlight | America |
| 13 | Bodyrox Ft Luciana | Yeah Yeah |
| 14 | Girls Aloud | Something Kinda Ooooh |
| 15 | The Killers | Bones |
| 16 | Christina Aguilera | Hurt |
| 17 | All Saints | Rock Steady |
| 18 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 19 | Amy Winehouse | Rehab |
| 20 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |

**Billboard** (Billboard)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Akon ft. Snoop Dogg | I Wanna Love You |
| 2 | Beyonce | Irreplaceable |
| 3 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 4 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 5 | The Fray | How To Save A Life |
| 6 | Hinder | Lips Of An Angel |
| 7 | Gwen Stefani | Wind It Up |
| 8 | Ludacris ft. Pharrell | Money Maker |
| 9 | Snow Patrol | Chasing Cars |
| 10 | Fergie | Fergalicious |
| 11 | Bow Wow Featuring Chris Brown & Johnta Austin | Shortie Like Mine |
| 12 | Jim Jones | We Fly High |
| 13 | Jay-Z | Show Me What You Got |
| 14 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 15 | The All-American Rejects | It Ends Tonight |
| 16 | Chris Brown | Say Goodbye |
| 17 | Nickelback | Far Away |
| 18 | Unk | Walk It Out |
| 19 | Carrie Underwood | Before He Cheats |
| 20 | Snoop Dogg ft. R. Kelly | That's That |

sound


Take That eru endurstovnaðir, tó hesaferð uttan Robbie Williams, ið er tann einasti upprunalimurin, ið veruliga hevur livað upp til successina í Take That.
mynd: Scanpix.dk

# Take That hitta aftur

Afturí afturkoman hjá størsta dreingjabólkinum nakrantíð, Take That, gongur munandi betur enn nakar hevði torað at spátt. Nýggja fløgan Beutiful World er farin beint inn á ovastu rók á enska sølulistanum, eisini á stakfløgulistanum halda Take That við lagnum Patience fast í ovastu rók, aðru viku á rað.
Á fløgulistanum er tað serliga Il Divo, ið bjóðar av við fløguni Siempre. Meðan stór nøvn sum Oasis, Westlife og The Beatles eisini vilja sleppa upp í part.
Á stakfløgu listanum er tað serliga Akon ft. Eminem, ið bjóða av við lagnum Smack That.
Gennaro Castaldo úr tónleikaketuni HMW sigur við enska blaðið The Sun, at tað eru fáir bólkar, ið uppliva at liggja ovast á bæði stakfløgu og fløguhitlistanum í senn, og heldur tað vera serliga sannførandi, at Take That megna hetta eftir ein 10 ára steðg.
Hann metur, at Take That liggja væl fyri at enda í nógv virðu støðuna, sum ovasta lag á sølulistanum á jólum, m.a. tí bólkurin í næstum spælir á The Royal Variety Performance og finaluni í The X Factor.

**nud**

# Vida Guerra ætlar at skapa vakran tónleik

Playboy nakinmodellin Vida Guerra ætlar at spretta sum popstjørna í 2007. Hetta verður gjørt í hennara egna super gentubólki. Týdningarmiklasti eginleikin, ið hon leitar eftir hjá sangarindum og dansarsarindum er, at tær síggja gott út og hava frálíkan kropp.
- Koregrafarnir hjá mær hildu hetta vera eitt gott hugskot, tí vanliga plaga popstjørnir at fáa sær ljótar dansarar, soleiðis at tey sjálvi síggja betur út, sigur hon við The Sun og heldur fram:
- Eg vil hava góðgæti til eyguni, eg havi fingið eina asiatiska gentu, eina indiska, tvær spanskar, tvær svartar og eina hvíta. So eg havi tað besta av øllum sløgum, sigur vakra Vida, ið ikki ræðist, at hon hvørvur í mongdini.

**nud**


Vida Guerra er serliga kend fyri sínar myndir í Playboy, men nú fer hon at gera tónleik.



Daniel Craig metur heimin vera til reiðar til samkyndan ástarleik í einum James Bond filmi.

# James Bond vil hava samkynda ást

Ein sena við samkyndari ást eigur at vera í næsta James Bond filmi, hetta heldur nýggi James Bond, sjónleikarin Daniel Craig, ið heldur hetta vera eitt natúrligt stig í menningini og moderniseringini av James Bond, ið vit síggja í Casino Royal, hetta skrivar tv2.dk.
– Hví ikki? Í okkara døgum hevur fólk góðtikið, at onnur eru samkynd, hygg bara at sjónvarpsrøðini Dr. Who, har eru samkyndar senur, uttan at tað hevur fingið ilt í nakran, sigur sjónleikarin.
Sambært leysasøgum í tv2.dk ber, so er Craig eisini til reiðar at vísa alt. Hann sigst at hava boða frá, at hann ongar trupulleikar hevur við at verða avmyndaður nakin frammanífrá í einum komandi James Bond filmi.

**nud**